# Viðmerking til Heina í Skorini og Hans Andrias Sølvará

JENS WANG

Løgfrøðingur, Hoyvík



Hesir báðir hava í vikuni havt hvør sína áhugaverda og sakliga blaðgrein, sum aftursvar upp á blaðgrein mína í farnu viku, ið bar heitið "ver tolsamur, tín talibani".

Báðir gera meg tó óbeinleiðis ella beinleiðis til talsmann fyri nei- síðuni í § 266b- kjakinum, og brúka síðani nógva orku upp á, at tala fyri ja- síðuni. Eg nevni annars ogna staðni í blaðgrein míni nakað, um mína persónligu støðu til júst hendan spurning???

Útsagnirnar hjá báðum um mannarættindi (alt gott um hesi) v.m. sum heimildargrundarlagi eru absoluttar. Er tað ikki júst hetta sum partar av nei- síðuni verður brigslað fyri at nýta sum grundarlag fyri sínum hugsanum? Sjálvmótsøgn?

Tá eg í blaðgrein míni sipaði til aktuella kjakið um § 266b í revsilógini, varð tað nevnt sum dømi at lýsa mín høvuðsboðskap – sum yvirskriftin og niðurstøðan eisini sigur frá – at tað er ótolsamt at koma við útsøgnum sum t.d. "ver tolsamur, tín talibani". Leggjast kann aftrat, at eru slíkar útsagnir sagdar av forsprákara fyri tolsemi, er útsøgnin haraftrat ein sjálvmótsøgn.

# Moralur er góður – dupultmoralur ringur!

KARIN EGHOLM



Eg var ein av teimum hepnu, sum slapp at sita á áhoyraraplássunum undir løgtingsviðgerðini, sum skuldi snúgva seg um, hvørt orðini "seksuel orientering" skulu skoytast upp í § 266b í revsilógini.

Eg gjørdist skelkað av at hoyra Jenis av Rana sitera bíbliuna frá tingsins røðarapalli, har hann serstakliga hávirdi Lot.

Jenis, tú segði bara helvtina av søguni. Tú tagdi um, at Lot jú framdi blóðskemd (incest) og fekk børn við sínum egnu døtrum!

Og hetta var søgan, tú brúkti at styrkja tínar grundgevingar fyri at forða samkyndum føroyingum í at fáa betri kor!

Moralur er góður – dupultmoralur ringur!

Hvør er t. d. tín viðmerking til, at ákæra í hesum døgum er reist móti 4000 prestum kring um í heiminum fyri at hava framt pædofili? Er tað ikki tíverri soleiðis, at pædofili og incest ov ofta kemur fyri í umhvørvum, sum eru fongd av ógvusligum og klaustrofobiskum religiøsiteti?

Tað vísir seg jú, at tess meira man háðar, fordømir og niðurger onnur, jú meira hevur man sjálvur at goyma....?

So Jenis, hóast eg eisini havi hvassar atfinningar móti løgtingsins formanni fyri ikki at passa sítt arbeiði – við at steðga tær í tíni fundamentalistisku og átrúnaðarligu prædiku frá einum parlamentariskum røðarapalli - so var eg kortini glað fyri, at tú segði, sum tú gjørdi. Tað fær meg nevniliga at gruna, at okkurt man vera, sum tú hevur at goyma – tí tjóvur trýr jú, at hvør maður stjelur, ikki so?

Og hvat billar tú tær inn, tá tú samanber samkynd við pædofil??!! Tú kanst ikki vera SO óupplýstur (ert tú ikki lækni eisini?), at tú ikki veitst, at homoseksualitetur merkir, at tvey javnstøðug vaksin menniskju forelska seg í hvørjum øðrum. Tað hevur EINKI við pædofili og blóðskemd móti børnum at gera! Men hetta roynir tú at fjala fyri tíni meinigheit og fólkinum í Føroyum – tøgn er gull, er tað ikki soleiðis, tú vilt hava tað at vera í Føroyum? Til frama fyri hvønn...? Fyri børnini og teirra rættindi????

Eg haldi eisini, at tín hávirðing av Lot og hansara pædofili er óhugnalig og vamlislig – hugsa sær, at tú troystar tær framman fyri eygunum á teimum ungu, ið sótu har á áhoyraraplássunum saman við mær, og sum tú fleiri ferðir talaði beinleiðis til....gys...

# Kæra um tingviðgerðina av munnligum fyrispurningum á tingfundinum 8. november 2006

Løgtingsformaðurin
Her
Tórshavn, 9. november 2006

Á tingfundinum 8. november 2006 vóru munnligir fyrispurningar á skránni. Sambært tingskipanini og ásetingum løgtingsformansins, høvdu tingfólk úr Tjóðveldisflokkinum sent Løgtingsskrivstovuni fyrispurningar innan kl. 11.30 dagin fyri. Teir vóru eftirkannaðir á Løgtingsskrivstovuni og sendir avvarðandi landsstýrismonnum, ið sostatt høvdu eitt samdøgur at fyrireika síni svar, sambært reglunum.

Tó fóru tvær hendingar fram á fundinum, sum eftir okkara tykki undirgrava rættin og skylduna hjá tingfólki at kanna og viðgera týdningarmikil mál, at fáa allar upplýsingar í ljós og at hava neyðuga eftirlitið við landsstýrinum. Hendingarnar skeikla javnvágna millum tingið og útinnandi valdið og er í okkara eygum greitt brot á ásetingarnar í tingskipanini um munnligar fyrispurningar til løgmann og landsstýrismenn og allar siðvenjur.

Tí verða hendingarnar hervið kærdar til Edmund Joensen, løgtingsformann, við áheitan um, at greið skrivlig niðurstøða verður gjørd um lutirnar í kæruni.

**Óli Breckmann støðgar fyrispurningi vísandi til avgerð í formansskapi og skírir hann "sirkus" og "glantrileik", og strikar síðani annan fyrispurning av skránni við somu grundgeving**

Høgni Hoydal hevði sent tveir fyrispurningar til løgmann inn rættstundis um skattapolitikkin hjá landsstýrinum. Teir vóru kannaðir á Løgtingsskrivstovuni, sendir løgmanni og settir á yvirlitið yvir spurningar, ið vórðu býttir út á tingfundinum. Talan var um tveir fyrispurningar sum av røttum vórðu settir løgmanni, tí báðir snúðu seg um tær politisku grundgevingarnar hjá samgonguni fyri ógvisligum búskaparpolitiskum og sosialpolitiskum tiltøkum.

Men tá tíðin var komin til fyrispurningarnar, fyrsti spurningur settur fram og tingfólk høvdu teknað til at taka lut í viðgerðini, boðaði løgmaður frá, at hann ikki helt seg vera tann rætta at svara, men vildi heldur havt spurningin beindan til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Síðani tók Óli Breckmann, sum sat í formansstólinum, orðið, og boðaði frá, at formansskapurin hevði viðgjørt gongdina við fyrispurningum (sum hann nevndi "sirkus"), og at semja var um, at orðaskiftið skuldi støðgast og ongin tingmaður fekk orðið. Óli Breckmann legði úr formansstólinum Høgna Hoydal undir tilætlað at hava sett skeivum persóni fyrispurningin. Høgni Hoydal fekk tó orðið og mótmælti framferðini og avgerðini hjá Óla Breckmann. Eftir hetta mótmæltu fleiri tingmenn høviskliga úr salinum og vístu á tingskipanina og siðvenjur. Øll mótmæli vórðu kveistrað til viks, og Óli Breckmann tók síðani uttan nakra viðgerð annan spurningin hjá Høgna Hoydal av skrá.

Hetta er eftir okkara meting:

**Greitt brot á tingskipanina:** Sambært tingskipanini §52 er ongin heimild at støðga tingviðgerð av munnligum fyrispurningi. Í stk.3 er ásett, at løgmaður ella landsstýrismaður kann boða frá, at hann ikki svarar munnliga, men vil hava spurningin settan sum skrivligan fyrispurning. Kortini er ongin heimild, at nokta tingmonnum orðið av hesum ávum. Í hesum føri bað løgmaður ikki um spurningin skrivliga, men vildi hava annan landsstýrismann at svara. Ongin heimild er at støðga fyrispurningi av tí at løgmaður ella landsstýrismaður vil hava annan at svara ella at nokta tingmonnum orðið av hesum ávum.

At løgtingsformaðurin viðvíkjandi seinna spurninginum, tekur hann av skrá, uttan at hann er munnliga settur fram ella løgmaður hevur svarað, er brot á alla §52, stk. 1-3.

**Grovt brot á góðan tingsið:** Óli Breckmann tosaði sum sitandi formaður niðrandi og háðandi um bæði spyrjara og fyrispurningarnar og nýtti orð, sum "sirkus", "glantrileikur", "spyrja í eyst", "spurningar settir skeivum persóni við vilja" o.a.m.

**Brot á siðvenjur og talufrælsi tingmanna:** Um tað ikki ber til at seta løgmanni spurningar um tær politisku avgerðirnar og grundgevingarnar hjá landsstýri og samgongu, so er tað brot á talufrælsi tingmanna og allar siðvenjur. Løgmaður hevur sambært stýriskipanina evstu ábyrgdina av embætisførslu og arbeiði landsstýrisins. Løgmenn hava altíð bæði í munnligum og skrivligum fyrispurningum svarað um politikkin hjá samgonguni á ymsum økjum sum skatt, mentan, útlendingamál, vinnumál, heilsumál, almannamál o.a. Skulu tílíkar siðvenjur broytast kann ein sitandi løgtingsformaður ikki bert broyta tað í mitt undir einum tingfundi. (At løgmaður ikki svarar er eisini meiningsleyst um vit samanbera við onnur lond. Eitt nú svarar danski forsætisráðharrin so at siga hvønn mikudag fyrispurningum í Fólkatinginum um politisku grundgevingarnar hjá stjórnini fyri øllum lógarbroytingum, ætlanum, útsagnum hjá øðrum ráðharrum, floksfeløgum o.s.fr. Um tingmenn frá fólkatingsformanninum ikki høvdu fingið orðið, bert tí forsætisráðharrin noktaði at svara, hevði tað verið óhoyrt.)

**Ósannar grundgevingar:** Ongin fráboðan og skjalfesting sæst um, at henda avgerðin hjá Óla Breckmann er stuðlað av formansskapinum ella av valda løgtingsformanninum, Edmundi Joensen, soleiðis sum Óli Breckmann bar fram undir avgerðini.

**Brot á skyldur løgtingsformansins:** Uppgáva løgtingsformansins er at halda tingskipanina og tryggja tingfólki rætt at útinna sín rætt og sínar skyldur. Løgtingsformaðurin fer í hesum føri í part við útinnandi valdinum og løgmanni, sum úttalaði seg niðrandi um spurningarnar frá tingfólki, og gongur sjálvur á odda fyri at bróta tingskipan, tingsið og siðvenjur. Formaðurin átti eftir okkara tykki at vart tingskipanina og rættindi tingmanna og ístaðin átalað løgmann fyri sína framferð og vanvirðing av skipanini við munnligum fyrispurningum.

**Løgmaður noktar at svara fyrispurningi vísandi til, at hann er ein "vittigheit"**

Á sama tingfundi hevði Torbjørn Jacobsen, tingmaður, sett fram fyrispurning um leiklut løgmans og landsstýrisins í viðgerðini av Irak-krígnum. Fyrispurningurin var rættstundis latin inn, eftirkannaður og sendur løgmanni.

Men tá løgmaður fekk orðið, noktaði hann at svara spurninginum og skírdi hann "eina vittigheit", Harafturat niðurgjørdi hann alla gongdina við spurningum til løgmann og landsstýrismenn.

Løgtingsformaðurin átalaði ikki løgmann fyri hesa vanviðring av tinginum. Ístaðin fingu tingmenn eina generella átalu undir viðgerðini fyri ikki at "vanda sær um orðini".

Samanumtikið kann tað als ikki góðtakast, at løgmaður vísir tinginum, tingskipanini og tingfólki slíka vanvirðing – og at løgtingsformaður heldur enn at átala løgmann, letur seg stýra av útsagnum frá útinnandi valdinum, sum Løgtingið skal hava eftirlitið við.

Vinarliga

**Høgni Hoydal**
**Torbjørn Jacobsen**
**Annita á Fríðriksmørk**
**Páll á Reynatúgvu**
**Finnur Helmsdal**
**Karsten Hansen**
**Heidi Petersen**
**Hergeir Nielsen**